KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 26.10.2017 kl. 17:30
Málnr.: 16/01208 Gerðabók

Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Gunvá við Keldu, Kristian Eli Zachariasen, Óli M. Lassen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen.

Varalimir: Kjartan á Gravarbø møtti fyri Óla M. Lassen

Onnur: Tummas T. Eliasen, kommunustjóri
Nevndarskrivari: Jensa Anthoniussen, stjórnarskrivari

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
93/17	17/01258-2	Býráðslimur burturstaddur – Óli M. Lassen
94/17	15/01111-10	Víðkað umsókn um frábýti av grundøkjum av matr. nr. 1489a sunnanfyri Geilina
95/17	17/01136-2	Umsókn um marknaumskipan, matr. nr. 795d, 715c, 738b og 863a
96/17	17/00505-9	Barnatannrøktin; hølisviðurskifti – *eykajáttan, fyrra viðgerð*
97/17	17/00687-8	Børn við avbjóðingum, serdeild undir Snjallubjallu – *eykajáttan, fyrra viðgerð*
98/17	17/01189-2	Nýggjan dagstovn, byggiskrá
99/17	17/01196-1	Virkishúsið – *eykajáttan, fyrra viðgerð*
100/17	12/00492-93	Avseting til reingerð; Gigni – *flyting millum kontur, seinna viðgerð*
101/17	13/00768-25	Broyting av kommunustýrisskipanini (Tilbúgvingarnevndin) - *seinna viðgerð*
102/17	16/00196-31	Møguligt innandura spælipláss – *eykajáttan, seinna viðgerð*
103/17	16/00277-38	Eykajáttan til Gigni á Fornagørðum - *seinna viðgerð*
104/17	16/00867-91	Vegir, Íløgur - 2017 - raðfesting av ymiskum arbeiðum – *eykajáttan, seinna viðgerð*
105/17	17/00233-24	Bygningurin á Stongunum, “Gamla bollafabrikkin”, matr 163q – *eykajáttan, seinna viðgerð*
106/17	17/00274-15	Dagføring av barnaverndarnevndarformanssamsýningini - Kommunustýrisskipanin - *seinna viðgerð*

107/17	17/00470-5	Uppnormering av Barnaverndartænastuni í Norðoyggjum – *eykajáttan, seinna viðgerð*
108/17	17/00655-9	Viðv. roknskapunum hjá NBH og Klaksvíkar kommunu

Til viðgerðar

93/17
17/01258 Býráðslimur burturstaddur – Óli M. Lassen

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Klaksvíkar Býráð	26.10.2017	93/17	

Frágreiðing um málið:
Óli M. Lassen, býráðslimur, hevur boðað borgarstjóranum frá, at hann verður burturstaddur næstu 14 dagarnar og fær tí ikki møtt til býráðsfundin 26. oktober 2017. Hann biður samstundis um, at næstvaldi á valevnislistanum fær fundarboð til býráðsfundin. Næstvaldur á listanum er Kjartan á Gravarbø.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin (KSL), grein 18, stk. 2:

> *Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.*

KSL, grein 18, stk. 3:

> *Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.*

Fíggjarligar avleiðingar:
Fundarsamsýning til varalimin, um býráðið avger at lata hann taka sæti í býráðnum til fundin.

Tilmæli:
Mælt verður til, at Kjartan á Gravarbø, ið er næstvaldur á valevnislistanum, tekur sæti í býráðnum á fundinum 26. oktober 2017 fyri Óla M. Lassen.

Býráðsins samtykt 26-10-2017
Tilmælið einmælt samtykt, og Kjartan á Gravarbø tók sæti í býráðnum.

94/17
15/01111 Víðkað umsókn um frábýti av grundøkjum av matr. nr. 1489a sunnanfyri Geilina

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.10.2017	73/17	
2 Tekniska Nevnd	18.10.2017	50/17	
3 Klaksvíkar Býráð	26.10.2017	94/17	

Frágreiðing um málið:

Klaksvíkar Býráð samtykti á fundi 10. des. 2015 at viðmæla frábýti av einum grundøki burtur av matr. nr. 1489a, treytað av, at ferðslurættur verður tinglisin yvir matr. nr. 1489a sum atkoma millum ætlaða frábýtta grundøkið og almennan veg. (víst við reyðum á kortinum).

Umsóknarskjølini vórðu send Umhvørvisstovuni til góðkenningar 11. des. 2015, men málið er framvegis ikki avgreitt.
6. juli 2017 kunnar Umhvørvisstovan Klaksvíkar kommunu um, at umsøkjarin hevur broytt umsóknina til at umfata frábýti av tveimum grundøkjum, og biður um kommununnar viðmæli til víðkaðu umsóknina. (sí við bláum á kortinum)

Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Í fyrsta umfari ongar. – Ávíst leiðingsarbeiði má fremjast í samband við byggiloyvið, tá eisini bæði stykkini verða kravd eftir íbindingargjaldi – kr. 50.000,- í part.

Tilmæli:
Talan er um økispart A10 útlagdur til m.a. sethúsaøki, og hevur Tekniska Deild tí onki ímóti at viðmæla sundurbýti av umsøktu grundøkjum - hetta tó treytað av at

- kommunan í fyrstu atløgu ongar útreiðslur kemur at hava av at gera vegin
- at kommunan tá, ella um tørvur verður á tí til víðari útstykking norðanfyri, fær til keyps neyðugt vegalendi frá matr. nr. 1489a.

UBN 16-10-2017
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku umsiting dagfest tann 09-10-2017.

TN 18-10-2017
Nevndin tekur undir við UBN 16-10-2017.

Býráðsins samtykt 26-10-2017
Tilmælið einmælt samtykt.

95/17
17/01136 Umsókn um marknaumskipan, matr. nr. 795d, 715c, 738b og 863a

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.10.2017	81/17	
2 Klaksvíkar Býráð	26.10.2017	95/17	

Frágreiðing um málið:
Eigararnir av matr. nr. 795d, 715c, 738b og 863a søkja um býráðsins viðmæli til marknaumskipan millum ognir sínar, sum víst á kortinum niðanfyri

Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert tilmælandi partur.

Tilmæli:
Mælt verður til at senda Umhvørvisstovuni málið við tilmæli um at játta.

UBN 16-10-2017
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku umsiting dagfest tann 05-10-2017.

Býráðsins samtykt 26-10-2017
Tilmælið einmælt samtykt.

96/17
17/00505 Barnatannrøktin; hølisviðurskifti – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	17.10.2017	47/17	
2 Fíggjarnevndin	24.10.2017	118/17	
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	26.10.2017	96/17	
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	16.11.2017		

Frágreiðing um málið:
Áðrenn summarsteðgin samtyktu avvarðandi nevndir og býráðið at fremja nakrar ábøtur á hølini hjá Barnatannrøktini.



Hans Fróði Hansen, byggifrøðingur, hevði fingið avtalu við Birgir Joensen, skúlatænara, sum vildi átaka sær at standa fyri arbeiðinum at fremja hesar hølisbroytingar.

Byrjað varð upp á arbeiðið í summarferiu skúlans, og hevur tað víst seg, at tað eru viðurskifti, sum krevja nakað meira av umvælingum, eitt nú er verandi el-skipan ikki lóglig sambært nútíðar krøvum.

Hans Fróði Hansen upplýsir, at hesi viðurskifti hava elvt til ein meirkostnað á 200.000 kr., soleiðis at kostnaðurin av hesi verkætlan økist úr teimum upprunaligu 500.000 kr. og upp í 700.000 kr.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg um barna- og ungdómstannrøkt, sum broytt við løgtingslóg nr. 39 frá 6. mai 2014, hevur eitt nú hesar ásetingar:
§ 2. Kommunustýrið skal tryggja øllum børnum og ungum undir 18 ár, sum búgva í kommununi, møguleika fyri ókeypis fyribyrgjandi og viðgerðandi tannrøkt.
§ 8. Kommunurnar bera tær útreiðslur, sum standast av kommunalu tannrøktini sambært § 2.

Fíggjarligar avleiðingar:
Hans Fróði Hansen upplýsir, at hann – saman við Birgir Joensen – metir, at hesar hølisbroytingar kunnu fremjast fyri samanlagt kr. 700.000.

Tilmæli:
Mælt verður nevndum og býráði til at taka undir við, at fremjingin av hesum alneyðugu hølisábótum heldur fram, og vísandi til, at hetta er ein partur av heildarætlanini fyri skúlabyggingina á Skúlatrøð, sum við hesum verður framskundaður nakað, verður mælt til, at meirkostnaðurin á 200.000 kr. somuleiðis verður fíggjaður av íløguavsetingini til skúlabyggingina á Skúlatrøð – hetta vísandi til, at talan er um somu skúlabygningar og heildarætlan.

TrN B&U 17-10-2017
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum dagfest 11.10.17.

FíN 24-10-2017
Nevndin tekur undir við TrN B&U 17-10-2017.

Býráðsins samtykt 26-10-2017
Tilmælið einmælt samtykt.

97/17
17/00687 Børn við avbjóðingum, serdeild undir Snjallubjallu – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	17.10.2017	43/17	
2 Fíggjarnevndin	24.10.2017	119/17	
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	26.10.2017	97/17	
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	16.11.2017		

Frágreiðing um málið:
Millum tey børnini, sum byrjaðu í 1. flokki í august 2017, er ein bólkur, størri enn vanligt, har hesi hava ymiskar avbjóðingar í gerandisdegnum. Kommununnar partur er at veita nøktandi frítíðarskúlatilboð.

Stórur partur av hesum børnum hava í eitt longri ella styttri tíðarskeið havt tilknýti til Perluna, sum er serstovan í Barnahúsinum Margit. Nøkur av hesum børnum hava síðani gingið í Fjallafípuni, og tað hevur riggað stak væl, og tí er møguligt, at veita onkrum teirra tilboð í Snjallubjallu við stuðulstímum.

Í Snjallubjallu er heilt øðrvísi enn í barnagarði. Fyri tað fyrsta er barnatalið oman fyri 100, og har eru børnini ikki skipaði í stovur, sum gjørt verður á dagstovnum. Eisini hava børnini rættiliga frítt at fara og koma, bara tey siga frá. Tað er eitt heilt annarleiðis umhvørvi, sum krevur, at børnini eru sjálvbjargin og sjálvstøðug.

Umsitingin hevur frá fakfólkum, sum kenna børnini, fingið at vita, at 5 børn eru, sum ikki megna eitt tilboð sum tað í Snjallubjallu, og tí verður mett, at tey vegna sín tørv skulu hava eitt sertilboð uttan fyri Snjallubjallu, sum tó er nærindis skúlaøkinum. Til hetta endamál er: "Skákið" (talvhúsið í Akursmørk) vælegnað.

Eitt tilboð av hesum slag krevur eisini skikkaði starvsfólk, og har hevur umsitingin saman við Beintu Klakstein, leiðara í Snjallubjallu, vent sær til Dagny Miðskarð, námsfrøðing í Perluni, og spurt, um hon kann standa á odda og fáa eitt tílíkt tilboð upp at koyra. Hetta hevur hon játtað at gera í eitt tíðarskeið. Neyðugt er sjálvandi eisini við øðrum starvsfólkum, tí avbjóðingin hjá hesum 5 børnum krevur hægri normering.

Lógargrundarlag:
Dagstovnalógin ásetur í § 5, at *børn við serligum tørvi hava rætt til tilboð um pláss á dagstovni og dagrøkt á jøvnum føti við onnur børn, sum búgva í kommununi, sambært § 3.*
Stk. 2. Til børn við serligum tørvi verða veittar nøktandi hølisumstøður og námsfrøðilig tilboð.
Stk. 3. Í ivamálum um tilboð skal veitast sambært hesi lóg, skal málið ávísast víðari til Almannastovuna, ið tekur avgerð.

Fíggjarligar avleiðingar:

	Í ár (2017) (kr.)	*Um árið (kr.)*
1 námsfrøðing á hægsta lønarstigi 28–30 t/viku	108.335	260.000
2 námsfrøðingar á lægri lønarstigi á 20 t/viku	145.835	350.000
Lønir íalt	254.170	610.000
Nýstlugjald av hølum v/ljós og hita (2.000 kr/mør)	10.000	24.000
Kostnaður íalt	**264.170**	**634.000**

Foreldragjøldini geva eina inntøku á kr 53.500 um árið, sum verður mett at bera annan rakstur enn lønir, sum standast av tilboðnum, og hetta nýggja tilboðið verður sostatt mett at kosta kr. 634.000 um árið. Fyri at vit kunnu veita hetta neyðuga tilboð, er tørvur á eini upphædd á 264.170,- kr. í inniverandi ári.

Umsitingin hevur onga kontu til hetta endamál at vísa á, og biðið verður tí um, at hetta verður fíggjað sum eykajáttan.

G.G.: Í 2018 er fíggjarliga avleiðingin 634.000,- kr, sum svarar til sertilboðið alt árið.

Tilmæli:
Mælt verður til at seta á stovn eina serdeild undir Snjallubjallu eftir omanfyri nevnda leisti, og at kostnaðurin í inniverandi ári á 264.170 kr. verður fíggjaður sum ein eykajáttan av tøkum peningi.

TrN B&U 17-10-2017
Málið verður beint í fíggjarnevndina.

FíN 24-10-2017
Ein meiriluti, Signhild V. Johannesen, Tummas J. Lervig og Herfrí J. Sørensen, tekur undir við tilmælinum, dagf. 09-10-2017.
Ein minniluti, Gunvá við Keldu, tekur støðu í býráðnum.

Býráðsins samtykt 26-10-2017
Beinta Klakstein luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.

Tilmælið, dagf. 9. okt. 2017, einmælt samtykt.

98/17
17/01189 Nýggjan dagstovn, byggiskrá

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.10.2017	K-22/17	
2 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	17.10.2017	45/17	
3 Tekniska Nevnd	18.10.2017	K-23/17	
4 Fíggjarnevndin	24.10.2017	121/17	
5 Klaksvíkar Býráð	26.10.2017	98/17	

Frágreiðing um málið:
Á býráðsfundi 23-03-2017 varð samtykt, at byggiskrá til nýggjan dagstovn skuldi gerast, og eftirfylgjandi varð ein arbeiðsbólkur settur at gera hetta arbeiðið. Samtykt varð eisini, at byggiskráin skuldi verða klár at leggja fyri politisku skipanina á heysti 2017. **Sí hjálagt sum undirskjal.**

Limirnir í byggiskrásbólkinum eru hesi:

- Beinta Klakstein, forkvinna í TrN B&U
- Tonja Ziskason, toymisleiðari B&U
- Sigrun Vágstún, barnaansingarsamskipari
- Høgni Kastalag, arkitektur FuglArk
- Sverri Michalsen, byggifrøðingur á Tekn. umsiting
- Maja Højsted, námsfrøðingur og leiðari í Mylnuhúsinum
- Diana Bertholdsen, námsfrøðingur og varaleiðari í Dr. Margrethu Barnagarði
- Rannvá á Steig, námsfrøðingur í Barnahúsinum Margit

Umframt at hitst við jøvnum millumbili hevur bólkurin fingið sær íblástur við at vitja dagstovnar í øðrum kommunum.

Í byggiskránni, sum nú fyriliggur, er talan um ein stovn við plássi til millum 76 og 84 børn. Tað idella barnatalið fyri ein dagstovn er 80 børn, bæði tá tað kemur til fíggjarligan rakstur og tey námsfrøðiligu stevnumiðini.

Havast skal í huga, at í byggiskránni eru øll hugsandi atlit tikin við. Tað verið seg umstøðurnar hjá børnum og starvsfólkum, innbúgv, leikur, útgerð (vognar o.líkn.), uttandura spæliøki við leikum, list, parkerings-umstøður, og at byggingin lýkur teknisku krøvini, sum komu í gildi í januar 2017.

<u>Tíðar- og arbeiðsætlan:</u>

Byggiskrá Medio oktober 2017
Skipanaruppskot februar 2018
Projektuppskot mai 2018
Forprojekt/søkja um byggiloyvi juni 2018
Høvuðsprojekt sept. 2018
Útboð okt. 2018
Tilboð uppá bygging latast inn. nov. 2018
Byggibyrjan jan. 2019
Bygningur avhendast apr. 2021
Innflyting mai 2021

<u>Lógargrundarlag:</u>
Dagstovnalógin ásetur, at tað er ábyrgd kommununnar at útvega tilboð um barnaansing í nøktandi karmum.

Í samtyktu barna- og ungdómsvirðunum fyri Klaksvíkar kommunu er henda orðing:

Øll hava rætt til eitt gott lív, og Klaksvíkar kommuna strembar við virðunum miðvíst ímóti at skapa karmar fyri góðum uppvakstrarkorum hjá øllum børnum og ungum í kommununi. Virðini verða framd av umsitingini og viðkomandi stovnum í kommununi saman við teimum sum varða av barninum og unglinganum. Foreldrini hava evstu ábyrgd av barninum og tess trivnaði, menning og læring, og kommunan skapar karmar fyri hesum.

<u>Fíggjarligar avleiðingar:</u>
Avsettar eru 200.000 kr til arbeiðið at gera byggiskrá. Enn er lítil upphædd brúkt, men vit hava ikki fingið rokning frá FuglArk fyri teirra leiklut í hesum arbeiði. Harumframt er ein limur í bólkinum, sum fær lønarendurgjald fyri mista arbeiðsinntøku.

Væntað verður, at avsetingin er nøktandi til tær útreiðslur, sum standast av arbeiðnum at gera byggiskrá.

Kostnaðarmeting fyri nýggjan dagstovn sambært byggiskránni:

Beinleiðis handverkaraútreiðslur	22.567.500 kr.
Óvæntaðar handverkaraútreiðslur 10,00%	2 .256.750 kr.
Prís & lønarvøkstur 2017-2020 5,00%	1 .128.375 kr.
Samlaðar handverkarútreiðslur 'HVÚ'	25.952.625 kr.
Umsiting av byggimáli 16,79%	4.357.183 kr.
Leyst innbúgv, útgerð og listarligt prýði 8,50%	2 .205.973 kr.
Leyst innbúgv og útgerð (innan- og uttandura) 7,00%	1.816.684 kr.
Listarligt prýði 1,50%	389.289 kr.
Ráðgeving ísv. leyst innbúgv, útgerð og listarligt prýði - 8%	176.478 kr.
Forkanningar, trygging, útlegg o.a. 3,00%	778.579 kr.
Kostnaður uttan Mvg.	3.470.838 kr.
Kommunu Mvg. 6,25%	2 .091.927 kr.
Byggiíløga samantald	**35.562.765 kr.**

(Stødd 1.254 m^2 og fermetrakostnaður 28.365 kr.)

Tilmæli:
Mælt verður til at fara undir tilgongdina at byggja nýggjan dagstovn eftir tí tíðarætlan, sum byggiskráin hevur lagt upp til, og at peningur verður settur av til at røkka verkætlanini í samsvari við tíðarætlanina.

UBN 16-10-2017
Málið verið til kunning.

TrN B&U 17-10-2017
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum dagfest 11.10.17.

TN 18-10-2017:
Málið verið til kunning.

FíN 24-10-2017
Nevndin tekur undir við B&U 17-10-2017, og at fígging av pkt. 10 í tíðar- og arbeiðsætlanini í 2018 verður at taka upp á temafundinum 2. nov.

Býráðsins samtykt 26-10-2017
Tilmælið frá FíN 24-10-2017 einmælt samtykt.

99/17
17/01196 Virkishúsið – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.10.2017	85/17	
2 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	17.10.2017	48/17	
3 Tekniska Nevnd	18.10.2017	56/17	

4 Fíggjarnevndin	24.10.2017	122/17	
5 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	26.10.2017	99/17	
6 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	16.11.2017		

Frágreiðing um málið:
Í 2015 var avgjørt at skifta út vindeyguni í Virkishúsinum. Vindeyguni skuldu keypast og rakstrarførast í 2015, og ísetingin fremjast og bókast í 2016. Avtala varð gjørd við P/F Aluplast um hetta, og tilboðini ljóðaðu upp á ávikavist kr. 91.590 og kr. 235.528,75 (v/mvg).

Vindeyguni vórðu keypt í desember 2015 og bókað sum rakstrarútreiðslur á kontu 146910 "Tilfar viðlíkahald v.m.). Rokningin var upp á tilboðsupphæddina kr. 73.272 + 25% mvg, samanlagt 91.590.

Vindeyguni vóru ísett sum avtalað í 2016, men tíverri kom rokningin ikki fyrr enn í august í ár.

Aluplast sigur, at tey eru kedd um, at rokningin kemur ov seint og hava sent okkum eina kreditnotu upp á 10%. Tey umbera seg við, at útskifting í starvsfólkahópinum er orsøkin til, at rokningin fyri arbeiðið ikki er send avstað til tíðina.

Rokningin er upp á 188.423,00 + mvg 47.105,75 ella íalt 235.528,75. Vit hava gjørt vart við okkara misnøgd, og tey hava í tí sambandi sent okkum eina kreditnotu á 10% svarandi til kr. 23.552,88 (íroknað mvg).

Tað kemur illa við, at rokningar koma eftir, at roknskaparárið er endað, og vit hava eisini gjørt Aluplast vart við okkara misnøgd.

Vit hava eisini kannað, um vit kunnu afturvísa rokningina. Tað er ikki so einfalt – vit hava fingið vøruna/tænastuna, og tí hava tey eitt krav móti okkum, sum vit sum meginregla eiga at gjalda. Spurningurin er eisini, um vit áttu at spurt eftir rokningini í 2016, tá vistu, at arbeiðið við ísetingini av vindeygunum var liðugt.

Virkishúsið hevur ikki nóg mikið av peningi til nevndu rokning, og tí verður mælt til, at kr. 200.000 tkr. verða fluttar frá *Fastognir íløgur* til *Virkishúsið íløgur* eins og víst í uppsetingini niðanfyri.

Av tí at hetta er eykajáttan og flyting millum 2 ymiskar greinar – flyta pening frá § 6 til § 3, eigur skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum.

Dim.	Rakstrarstað	Konta	Kontuheiti	Uppruna-ætlan 2017	Broyting ætlan 2017	Dagførd ætlan 2017
3241270160	Virkishúsið (íløgur)	313200	Bygningar, (almentarb.orka)	0	180.000	180.000
				0	180.000	180.000
6113170114	Fastognir (Íløga)	313100	Bygningar, (privat arb.orka)	0		
6113170114	Fastognir (Íløga)	313200	Bygningar, (almentarb.orka)	5.150.000	-180.000	4.970.000
6113170114	Fastognir (Íløga)	323000	Bygningar	0		
6113170114	Fastognir (Íløga)	751100	Keyps-mvg	0		
6113170114	Fastognir (Íløga)	759800	Endurrindan av keyps-mvg kommunur	0		
				5.150.000	-180.000	4.970.000

Fíggjarligar avleiðingar:
Avsetingin til fastognir er í dag 5.150 tkr., nýtslan er í dag 2.669 tkr. ella 48%. Nógv bendir á, at rakstrarstaðið kemur at hava avlop, og tí skuldi peningur verið til Virkishúsið.

Nevnast skal, at keypið av ognini frá Andrias Sundskarð (1,4 mió. kr.) skal bókast av *Fastognum íløgur*, men upphæddin verður fíggjað við eykajáttan. Tvs. at avsetingin til *Fastognir íløgur* hækkar við 1,4 mió. kr.

Lógargrundarlag:
Sambært § 41 stk. 2 í kommunustýrislógini kann kommunustýrið um neyðugt veita eykajáttan. Eykajáttan krevur tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon verður fíggjað.

Tilmæli:
Mælt verður til, at 200 tkr. verða fluttar millum kontur frá “Fastognir íløgur” til “Virkishúsið íløgur”.

UBN 16-10-2017
Nevndin mælir til at raðfesta pengarnar 2018.

TrN B&U 17-10-2017
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, dagfest 11.10.17. Nevndin mælir samstundis til, at greiðar mannagongdir verða ásettar á hesum øki.

TN 18-10-2017
Nevndin tekur undir við TrN B&U 17-10-2017.

FíN 24-10-2017
Ein meiriluti, Signhild V. Johannesen, Tummas J. Lervig og Herfrí J. Sørensen, tekur undir við B&U 17-10-2017.
Ein minniluti, Gunvá við Keldu, tekur undir við UBN 16-10-2017.

Býráðsins samtykt 26-10-2017
Einmælt samtykt at beina málið aftur í umsitingina.

100/17
12/00492 Avseting til reingerð, Gigni – *flyting millum kontur, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	19.09.2017	34/17	
2 Fíggjarnevndin	26.09.2017	97/17	
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	03.10.2017	72/17	
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	26.10.2017	100/17	

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum tann 3. oktober 2017.

TrN B&U 19-09-2017
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 12.09.17.

FíN 26-09-2017
Nevndin tekur undir TrN B&U 19-09-2017.

Býráðsins samtykt 03-10-2017
Tilmælið frá FíN 26-09-2017 einmælt samtykt.

Býráðsins samtykt 26-10-2017
Einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

101/17
13/00768 Broyting av kommunustýrisskipanini (Tilbúgvingarnevndin) – *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Fíggjarnevndin	26.09.2017	101/17	
2 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	03.10.2017	76/17	
3 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	26.10.2017	101/17	

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum tann 3. oktober 2017.

FíN 26-09-2017
Nevndin tekur undir við broyttu orðingunum um tilbúgvingarnevnd í kommunustýrisskipanini. Nevndin tekur eisini undir við uppskotinum til reglugerð og minstakravslista.

Ein minniluti, Gunvá við Keldu og Herfrí J. Sørensen, tekur somuleiðis undir við minnilutanum í TN 20-09-2017, um at býráðsminnilutin verður umboðaður í tilbúgvingarnevndini.

Býráðsins samtykt 03-10-2017
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í FíN 26-09-2017; tað varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig og Óli

M. Lassen) og 5 atkvøðum ímóti (Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen).

Býráðsins samtykt 26-10-2017
Atkvøtt varð um býráðssamtyktina frá 3. okt. 2017, tvs. meirilutatilmælið í FíN 26-09-2017; hon varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig og Kjartan á Gravarbø) og 5 atkvøðum ímóti (Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen).

Harumframt staðfest, at Tilbúgvingarnevndin verður soleiðis mannað:

- borgarstjórin í Klaksvíkar kommunu, sum er formaður
- borgarstjórin í Hvannasunds kommunu
- borgarstjórin í Viðareiðis kommunu
- borgarstjórin í Kunoyar kommunu
- borgarstjórin í Fugloyar kommunu
- Finn Hansen, felags tilbúgvingarleiðari, og
- Bjarni Fróði Nattestad, umboð fyri Føroya Landfúta.

102/17
16/00196 Møguligt innandura spælipláss – *eykajáttan, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Fíggjarnevndin	26.09.2017	107/17	
2 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	03.10.2017	79/17	
3 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	26.10.2017	102/17	

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum tann 3. oktober 2017.

FíN 26-09-2017
Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig, tekur undir við eini eykajáttan á 1 mió. kr. til Spælilandið, ið verður fíggjað av meirinntøkum, ið eru mettar til 6 mió. og eina lækking av avdráttum til 2,5 mió. vísandi til aðrar tillagingar, ið verða gjørdar hetta umfarið.

Ein minniluti, Gunvá við Keldu og Herfrí J. Sørensen, mælir til, at málið verður tikið við í fíggjarætlanararbeiðið fyri 2018.

Býráðsins samtykt 03-10-2017
Atkvøtt varð um broytingaruppskot frá Steinbjørn O. Jacobsen um at koyra málið aftur í umsitingina. Tað fall við 5 atkvøðum fyri (Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen) og 6 atkvøðum ímóti (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig og Óli M. Lassen).

Atkvøtt varð síðani um meirilutatilmælið í FíN 26-09-2017; tað varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig og Óli M. Lassen) og 5 atkvøðum ímóti (Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen).

Býráðsins samtykt 26-10-2017
Atkvøtt varð um býráðssamtyktina frá 3. okt. 2017, tvs. meirilutatilmælið í FíN 26-09-2017; hon varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig og Kjartan á Gravarbø) og 5 atkvøðum ímóti (Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen).

103/17
16/00277 Eykajáttan til Gigni á Fornagørðum – *eykajáttan, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	19.09.2017	35/17	
2 Fíggjarnevndin	26.09.2017	99/17	
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	03.10.2017	73/17	
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	26.10.2017	103/17	

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum tann 3. oktober 2017.

TrN B&U 19-09-2017
Nevndin samtykti, at taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 12.09.17.

FíN 26-09-2017
Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig, tekur undir við eini eykajáttan á 100 tús. kr. til Smábarna Gigni, ið verður fíggjað av meirinntøkum, ið eru mettar til 6 mió. og eina lækking av avdráttum til 2,5 mió. vísandi til aðrar tillagingar, ið verða gjørdar hetta umfarið.

Ein minniluti, Gunvá við Keldu og Herfrí J. Sørensen, tekur undir við meirilutatilmælinum, men mælir til, at avdráttirnir verða settir til. 4 mió.

Býráðsins samtykt 03-10-2017
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í FíN 26-09-2017; tað varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig og Óli M. Lassen) og 5 atkv. ímóti (Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen).

Býráðsins samtykt 26-10-2017
Atkvøtt varð um býráðssamtyktina frá 3. okt. 2017, tvs. meirilutatilmælið í FíN 26-09-2017; hon varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig og Kjartan á Gravarbø) og 5 atkv. ímóti (Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen).

104/17
16/00867 Vegir, Íløgur, 2017; raðfesting av ymiskum arbeiðum – *eykajáttan, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað

1 Tekniska Nevnd	20.09.2017	38/17	
2 Fíggjarnevndin	26.09.2017	103/17	
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	03.10.2017	78/17	
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	26.10.2017	104/17	

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum tann 3. oktober 2017.

TN 20-09-2017:
Nevndin tekur undir við tilmælinum.

FíN 26-09-2017
Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig, tekur undir við eini eykajáttan á 2,25 mió. kr. til Vegir, Íløga, ið verður fíggjað av meirinntøkum, ið eru mettar til 6 mió. og eina lækking av avdráttum til 2,5 mió. vísandi til aðrar tillagingar, ið verða gjørdar hetta umfarið.

Ein minniluti, Gunvá við Keldu og Herfrí J. Sørensen, tekur undir við meirilutatilmælinum, men mælir til, at avdráttirnir verða settir til. 4 mió.

Býráðsins samtykt 03-10-2017
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í FíN 26-09-2017; tað varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig og Óli M. Lassen) og 5 atkvøðum ímóti (Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen).

Býráðsins samtykt 26-10-2017
Atkvøtt varð um býráðssamtyktina frá 3. okt. 2017, tvs. meirilutatilmælið í FíN 26-09-2017; hon varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig og Kjartan á Gravarbø) og 5 atkvøðum ímóti (Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen).

105/17
17/00233 Bygningurin á Stongunum, "Gamla Bollafabrikkin", matr 163q – *eykajáttan, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Havna- og Vinnunevndin	18.09.2017	28/17	
2 Fíggjarnevndin	26.09.2017	83/17	
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	03.10.2017	77/17	
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	26.10.2017	105/17	

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum tann 3. oktober 2017.

HaVN 18-09-2017
Nevndin tekur undir við at vetrartryggja bygningin og finna neyðuga pening innan verandi játtan og um neyðugt eykajáttan.

FíN 26-09-2017
Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig, tekur undir við eini eykajáttan á 500 tús. kr. til "Bollafabrikkina", ið verður fíggjað av meirinntøkum, ið eru mettar til 6 mió. og eina lækking av avdráttum til 2,5 mió. vísandi til aðrar tillagingar, ið verða gjørdar hetta umfarið.

Ein minniluti, Gunvá við Keldu og Herfrí J. Sørensen, tekur undir við meirilutatilmælinum, men mælir til, at avdráttirnir verða settir til. 4 mió.

Býráðsins samtykt 03-10-2017
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í FíN 26-09-2017; tað varð samtykt við 7 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig, Óli M. Lassen og Atli S. Justinussen) og 4 atkvøðum ímóti (Gunvá við Keldu, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen).

Býráðsins samtykt 26-10-2017
Atkvøtt varð um býráðssamtyktina frá 3. okt. 2017, tvs. meirilutatilmælið í FíN 26-09-2017; hon varð samtykt við 7 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig, Kjartan á Gravarbø og Atli S. Justinussen) og 4 atkvøðum ímóti (Gunvá við Keldu, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen).

106/17
17/00274 Dagføring av barnaverndarnevndarformanssamsýningini; kommunustýrisskipanin – *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	19.09.2017	40/17	
2 Fíggjarnevndin	26.09.2017	94/17	
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	03.10.2017	75/17	
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	26.10.2017	106/17	

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum tann 3. oktober 2017.

TrN B&U 19-09-2017
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 13.09.17.

FíN 26-09-2017
Nevndin tekur undir við TrN B&U 19-09-2017.

Býráðsins samtykt 03-10-2017
Tilmælið frá FíN 26-09-2017 einmælt samtykt.

Býráðsins samtykt 26-10-2017
Einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

107/17
17/00470 Uppnormering av Barnaverndartænastuni í Norðoyggjum – *eykajáttan, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	19.09.2017	37/17	
2 Fíggjarnevndin	26.09.2017	95/17	
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	03.10.2017	74/17	
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	26.10.2017	107/17	

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum tann 3. oktober 2017.

TrN B&U 19-09-2017
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 12.09.17.

FíN 26-09-2017
Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig, tekur undir við eini eykajáttan á 40 tús. kr. til BVT, ið verður fíggjað av meirinntøkum, ið eru mettar til 6 mió. og eina lækking av avdráttum til 2,5 mió. vísandi til aðrar tillagingar, ið verða gjørdar hetta umfarið.

Ein minniluti, Gunvá við Keldu og Herfrí J. Sørensen, tekur undir við meirilutatilmælinum, men mælir til, at avdráttirnir verða settir til. 4 mió.

Býráðsins samtykt 03-10-2017
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í FíN 26-09-2017; tað varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig og Óli M. Lassen) og 5 atkv. ímóti (Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen).

Býráðsins samtykt 26-10-2017
Atkvøtt varð um býráðssamtyktina frá 3. okt. 2017, tvs. meirilutatilmælið í FíN 26-09-2017; hon varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig og Kjartan á Gravarbø) og 5 atkv. ímóti (Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen).

108/17
17/00655 Viðv. roknskapunum hjá NBH og Klaksvíkar kommunu

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Fíggjarnevndin	24.10.2017	126/17	
2 Klaksvíkar Býráð	26.10.2017	108/17	

Frágreiðing um málið:

Í samband við stovnan av NBH tók ein tvídráttur millum Fíggjarmálaráðið og Klaksvíkar kommunu viðvíkjandi skrásetingini av lántøkuni, í samband við at NBH keypti Sambýlið á Heygnum, og hinar kommunurnar goldu fyri teirra lutfalsliga part av Heiminum við Vágna.

Í september 2015 samtykti stýrið fyri NBH at keypa Sambýlið á Heygnum fyri 20 mió. kr. Samtykt varð eisini, at hinar kommunurnar skuldu gjalda 6 mió. kr. til Klaksvíkar kommunu fyri at fáa part í Heiminum við Vágna. Við hesum hava kommunurnar fingið felags ognarpart til allar búeindirnar hjá NBH, og harvið eru kommunurnar javnsettar viðvíkjandi visitatión og ognarskapi.

Frá kommununnar síðu hevur sjónarmiðið verið, at NBH er ein interkomunalur felagsskapur og var eisini av Almanna- og Heilsumálaráðnum góðkendur sum tað. Fíggjarmálaráðið er av teirri fatan, at NBH einans er ein umsitingarlig skipan og kann ikki upptaka lán. Lán í samband við virksemið hjá NBH skal tí bókast í roknskapunum hjá kommununum í NBH.

Drúgt samskifti hevur verið partanna millum fyri at finna eina loysn á málinum. Tað vísti seg ikki at vera møguligt, og er tí niðurstøðan, at lániskuldin hjá NBH verður tikin upp í roknskapirnar hjá kommununum í NBH. Fylgjandi broytingar verða gjørdar í roknskapinum.

Viðmerkingar til uppgerðina
Vit hava í uppgerðini brúkt tølini, sum eru í góðkendu roknskapunum 2015 og 2016.

Uppruni til íløgu, lántøku og rentu
Avgjørt var at fíggja handlarnar við lántøku í Norðoya Sparikassa áljóðandi 26 mió. kr., har tey fyrstu árini eru avdráttarfrí.
Renturnar vóru í 2015 kr. 198.941 og 2016 kr. 768.342.

Roknskapur 2015
Í 2015 eru renturnar kr. 198.941. Hetta merkir, at um renturnar skulu førast aftur, so lækkar raksturin hjá NBH úr 62.737 tkr. til 62.538 tkr. Flytingarnar frá kommununum lækka samsvarandi og verða nú 56.176 tkr. móti 56.375 tkr í roknskapinum.

	Roknskapur NBH 2015	Rætting rentur	Tillagaður roknskapur NBH 2015
Rakstrarútreiðslur	62.737.044	-198.941	62.538.103
Inntøkur búfólk og brúkarar	-6.361.955		-6.361.955
Flytingar frá kommunum	-56.375.089	198.941	-56.176.148
Úrslit	0	0	0

Niðanfyri er uppgerð, sum vísir, hvussu renturnar verða at býta millum kommunurnar. Um lánini vóru við í roknskapunum 2015, so skuldu kommunurnar rakstrarført upphæddirnar niðanfyri undir rentugjaldinum.

Her er útgreiningin í av rentunum í roknskapinum 2015:

Íbúgvar 31-12-2013 Rentur 2015	Íbúgvar 67+	Partur av útr (%)	Renta á Heygnum	Renta við Vágna	Renta íalt
Fugloyar	9	1,0	1.637	3.115	4.752
Viðareiðis	37	4,2	6.729	12.805	19.535
Hvannasunds	43	4,9	7.821	14.882	22.702
Klaksvíkar	760	86,9	138.225	0	138.225
Kunoyar	24	2,7	4.365	8.306	12.671
Húsa	2	0,2	364	692	1.056
	875	**100,0**	**159.141**	**39.800**	**198.941**

Úrslitið av hesum er, at flytingarútreiðslan til NBH lækkar samanlagt 198.941, og rentugjaldingarnar hækka 198.941, so netto hevur hetta ongan ávirkan á raksturin hjá einstøku kommununum.

Lántøka kr. 26.000.000.

Lánini, sum NBH tók í september 2015 til keyp av Sambýlinum á Heygnum (20 mió. kr.) og Heimið við Vágna (6 mió. kr.) fyri samanlagt 26 mió. kr., verða at býta millum kommunurnar, sum víst niðanfyri.

Íbúgvar 31-12-2013 Lán 2015 íalt	Íbúgvar 67+	Partur av útr (%)	Lán á Heygnum	Lán við Vágna	Lán íalt
Fugloyar	9	1,0	205.714	469.565	675.280
Viðareiðis	37	4,2	845.714	1.930.435	2.776.149
Hvannasunds	43	4,9	982.857	2.243.478	3.226.335
Klaksvíkar	760	86,9	17.371.429	0	17.371.429
Kunoyar	24	2,7	548.571	1.252.174	1.800.745
Húsa	2	0,2	45.714	104.348	150.062
	875	**100,0**	**20.000.000**	**6.000.000**	**26.000.000**

Tað merkir, at um lánini vóru tikin við í roknskapunum hjá kommununum í 2015, so hevði skuldin hjá einstøku kommununum hækkað, sum víst í uppgerðini.

Lánini eru avdráttarfrí fyrstu árini, og tí er bara renta at gjalda í 2015 og 2016.

Íløgur at bóka (kr. 26.000.000)

Ognirnar eru bókaðar til kr. 26.102.000, sum er kr. 102.000 hægri enn lántøkan. Orsøkin til hetta er, at tinglesingargjaldið er lagt afturat keypsprísinum. Niðanfyri eru upphæddirnar, sum kommunurnar skulu bóka sum íløgur undir § 2 í teirra roknskapum. Leggjast skal afturat, at Klaksvíkar kommuna hevur goldið tinglesingargjaldið, og at hetta er ikki býtt út á kommunurnar og er heldur ikki við í uppgerðini niðanfyri.

Íbúgvar 31-12-2013 Íløgur 2015 íalt	Íbúgvar 67+	Partur av útr (%)	Lán á Heygnum	Lán við Vágna	Lán íalt
Fugloyar	9	1,0	205.714	469.565	675.280
Viðareiðis	37	4,2	845.714	1.930.435	2.776.149
Hvannasunds	43	4,9	982.857	2.243.478	3.226.335
Klaksvíkar	760	86,9	17.371.429	0	17.371.429
Kunoyar	24	2,7	548.571	1.252.174	1.800.745
Húsa	2	0,2	45.714	104.348	150.062
	875	**100,0**	**20.000.000**	**6.000.000**	**26.000.000**

Hetta merkir, at fíggjarstøðan hjá NBH ikki hevur ognir ella skuld.

Roknskapur 2016
Í roknskapinum 2016 er tað, sum áður nevnt, einans renturnar at regulera. Rentan er 748 tkr., og við hesum lækkar raksturin hjá NBH úr 63.473 tkr. til 62.725 tkr. Flytingarnar frá kommununum lækka samsvarandi og verða nú 56.424 tkr. móti 57.173 tkr í roknskapinum.

	Roknskapur NBH 2016	Rætting rentur	Tillagaður roknskapur NBH 2016
Rakstrarútreiðslur	63.473.925	-748.342	62.725.583
Inntøkur búfólk og brúkarar	-6.300.777		-6.300.777
Flytingar frá kommunum	-57.173.148	748.342	-56.424.806
Úrslit	0	0	0

Rentuútreiðslurnar eru býttar soleiðis út á kommununar í 2016:

Íbúgvar 31-12-2013 Rentur 2016	Íbúgvar 67+	Partur av útr (%)	Renta á Heygnum	Renta við Vágna	Renta íalt
Fugloyar	9	1,0	6.157	11.718	17.875
Viðareiðis	37	4,2	25.313	48.175	73.488
Hvannasunds	43	4,9	29.417	55.987	85.404
Klaksvíkar	760	86,9	519.935	0	519.935
Kunoyar	24	2,7	16.419	31.249	47.668
Húsa	2	0,2	1.368	2.604	3.972
	875	**100,0**	**598.609**	**149.733**	**748.342**

Úrslitið av hesum er, at flytingarútreiðslan til NBH lækkar samanlagt 748.342, og rentugjaldingarnar hækka 748.342, so netto hevur hetta ongan ávirkan á raksturin hjá einstøku kommununum.

Fíggjarligar avleiðingar:
Kommununnar partur av skuldini hjá NBH á 17,4 mió. kr. verður tikin við í roknskapin hjá Klaksvíkar kommunu.

Tilmæli:
Mælt verður til, at fíggjarnevndin samtykkir hesar broytingar.

FíN 24-10-2017
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 19-10-2017.

Borgarstjorin niðurlegði fundin kl. 18.35; fundurin varð tikin upp aftur kl. 18.50.

Býráðsins samtykt 26-10-2017
Einmælt samtykt at beina málið aftur í umsitingina.